# Nógv oljuvirksemi fyri fram

**Tolin trívst sigur orðatakið. Nú fáa vit so at síggja, hvussu tolin oljufeløgini verða. Enn eru "bara" gingin umleið góð 10 ár, síðani føroyska oljutilgongdin byrjaði við oljulóggávu og seismiskum kanningum. Kanska verður 2006 – kanska 2007 – gjøgnumbrotsárið.. Ella hevur gjøgnumbrotið longu verið. Nevniliga tá olju-gigantarnir ChevronTexaco og Statoil gjørdu Rosebank-fundið hinumegin markið. Kanska var tann hendingin jús t tað, sum skuldi til fyri at varðveita og menna áhugan fyri føroyska landgrunninum, og sum harvið er grundarlagið fyri framtíðar boringum. Vit fara nú at síggja nógv virksemi aftur á landgrunninum, fyrst seismiskar kanningar, síðani boringar**

OLJULEITING
ANALYSA

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Nú várið nærkast um okkara leiðir, er stendur eisini ein spírandi tíð fyri framman í leitanini eftir kolvetnum í føroysku undirgrundini. Í kjalarvørrinum á loyvunum, sum latin vórðu í 2. útbjóðing, skulu nógvar kanningar gerast á landgrunninum. Seinasta hond verður í løtuni løgd á fyrireikingarnar til hesar kanningar, sum fyri tað mesta snúgva seg um at skjóta seismikk. Men eisini aðrar kanningar verða gjørdar. Eitt nú kanningar á sjálvum havbotninum.

Tað eru fyrst og fremst feløgini, ið vórðu tillutað loyvi í 2. útbjóðing, sum fara undir hesar kanningar, eitt nú Statoil og ChevronTexaco. Men eisini smærri feløg sum Atlants Kolvetni og Føroya Kolvetni fara at seta skjøtil á seismiskar kanningar á føroyaøkinum. Hetta eru so kanningar, sum skulu vísa feløgunum vegin og røttu støðini at seta hol á undirgrundina, um so er, at feløgini frá 2. rundu velja at bora eisini komandi árini. Hesi økini liggja nakað norðari á landgrunninum og út móti markinum, um framt sera áhugaverda Wyville Thomsen ryggin heilt fyri sunnan.




*Nógv seismikkskip verða at síggja á Føroyaleiðini í summar*




*Sum sæst her so verður nógvur seismikkur skotin á landgrunninum í ár og næsta ár. Her uppskot til arbeiðsskrá frá seismikkfelagnum WesternGeco, sum varð í umsóknartilfarinum til 2. Útbjóðing frá Oljufyrisitingini*

Men tað snýr seg so eisini um kanningar í loyvunum feløg fingu tillutað í 1. útbjóðing í ár 2000. Tilsamans fýra brunnar eru eftir at bora frá hesi útbjóðingini og skulu teir verða boraðir innan ársenda 2006. Haraftrat skulu feløgini, sum somuleiðis fingu tillutað 9 ára loyvi í 2000 eisini koma við eini ætlan, har tey gera av, antin tey vilja bora í sínum 9 ára loyvum ella ikki. Velja tey ikki at bora næstu árini fella hesi loyvini so aftur til myndugleikarnar. Samanumtikið kann sigast, at ein spennandi tíð stendur fyri framman, tá tað um kolvetni í føroysku undirgrundini ræður.

## Statoil og Hess

Sum skilst eru feløgini sínamillum og síðani eisini í samráðingum við føroysku myndugleikarnar við at gera klárt til at bora teir fýra brunnarnar í 2006 tvs. um gott og væl eitt ár. Væl vitandi at feløgini ikki halda tað vera skilagott at bora hesar brunnar í sjálvum loyvisøkjunum tey fingu tillutað í 2000 - Gullhornið - og sum hava víst vánalig úrslit við teimum fýra brunnunum, sum longu eru boraðir har, so er tað eitt greitt ynski frá feløgunum at kunna flyta teir írestandi brunnarnar til onnur øki á landgrunninum.

Og her eru so tríggir møguleikar. Ein er at flyta teir í okkurt av 9 ára loyvunum, ein annar er at fáa pláss í onkrum av loyvunum, sum eru latin í 2. útbjóðing og loksins kann ein møguleiki so eisini vera at flyta teir til øki, sum hvørki eru umfatað av 1. ella 2. útbjóðing. Hesin møguleikin er tó helst bert teoretiskur.

Skulu vit so meta um hinar báðar møguleikar er tað mest sannlíkt, at brunnarnir verða fluttir til 9 ára loyvisøki. Tað ljóðar, at Statoil fer at flyta sín brunn